# Steypakappingar lidnar

## Triðja steypakappingin

**Kvinnur (gólv)**
1. Kristina Toftegaard, HF . . . . . . . . 13,55
2. Friðhild Norðgerð, HF . . . . . . . . . 12,50
3. Katrin Wardum, HF . . . . . . . . . . . 12,45

**Menn (ringar)**
1. Øssur Debes Eiriksfoss, HF . . . . . 12,45
2. Jóni Christiansen, HF . . . . . . . . . . 11,45

**Menn (lop)**
1. Øssur Debes Eiriksfoss, HF . . . . . 13,92
2. Jóni Christiansen, HF . . . . . . . . . . 12,83

**Kvinnuunglingar (gólv)**
1. Eyðvør W. Samuelsen, Ljósið . . . 10,45
2. Bára Persson, HF . . . . . . . . . . . . . 10,00
3. Bjarta Jansdóttir, HF . . . . . . . . . . . 9,80

**Mansunglingar (ringar)**
1. Sofus Andreasen, HF. . . . . . . . . . 10,30
2. Pætur Jacobsen, HF . . . . . . . . . . . . 5,25

**Mansunglingar (lop)**
1. Pætur Jacobsen, HF . . . . . . . . . . . 12,15
2. Sofus Andreasen, HF. . . . . . . . . . 12,07

**Gentur (gólv)**
1. Marianna G. Eystberg, Ljósið . . . 19,40
2. Lív B. Árting, HF . . . . . . . . . . . . . . 18,80
3. Heidi Bendtsen, HF . . . . . . . . . . . 18,70

**Dreingir (ringar)**
1. Bartal Wardum, HF . . . . . . . . . . . . 6,40
2. Rani Petersen, HF . . . . . . . . . . . . . 6,20
3. Tóri Atlason, HF . . . . . . . . . . . . . . . 5,10

**Dreingir (lop)**
1. Bartal Wardum, HF . . . . . . . . . . . 12,73
2. Tór av Skarði, HF . . . . . . . . . . . . . 12,43
3. Johan Petersen, HF . . . . . . . . . . . 12,07

**Dreingir (beinsveiggj)**
1. Rani Petersen, HF . . . . . . . . . . . . . 8,00
2. Johan Petersen, HF . . . . . . . . . . . . 7,80
3. Tóri Atlason, HF . . . . . . . . . . . . . . . 6,00

**Smádreingir (ringar)**
1. Hannes Agnarson, HF . . . . . . . . . 17,90
2. Rani A. Dalsgarð, HF . . . . . . . . . . 16,30
3. Heini Mohr Samson, HF. . . . . . . . 15,35

**Smádreingir (lop)**
1. Aron Jacobsen, HF . . . . . . . . . . . . 16,75
2. Hannes Agnarson, HF . . . . . . . . . 16,45
3. Ragnar Ey. Samuelsen, Ljósið. . . 16,35

**Smádreingir (beinsveiggj)**
1. Hannes Agnarsson, HF . . . . . . . . 12,50
2. Rani A. Dalsgarð, HF . . . . . . . . . . 10,90
3. Jákup Jørgensen, HF. . . . . . . . . . 10,55

## Landsliðs-úttøka

**FIMLEIKUR** Sunnudagin skal landsliðið í amboðsfimleiki, sum í summar skal til oyggjaleikir á Isle of Wight, takast út

Hilmar Jan Hansen

Fyri at kunna vera við á oyggjaleikalandsliðnum í fimleiki, skalt tú vera 14 ár ella eldri, so tað eru bert fimleikarar, ið svara til tann aldurin, ið kunnu bjóða seg fram har. Tó hevur Fimleikasambandið gjørt av eisini at taka út eitt yngru dreingjalið, ið hevur eitt lægri aldursmark, ið er sett til 11 ár.

Ætlanin er, at oyggjaleikalandsliðið skal venja tríggjar ella fýra ferðir um mánaðin, og tað verður allarhelst sunnudagar. Annars fáa fimleikararnir boð frá venjarunum um, hvat arbeiðast skal við úti í feløgunum millum felags venjingarnar.

Sunnudagin, tá úttøkan til landsliðið verður, skulu eldru fimleikararnir gera øll seks amboðini, ið eru á skránni á oyggjaleikunum, umframt at seriur eftir FIG-reglunum skulu gerast til amboðini. Hetta er tó ikki galdandi fyri teir yngru fimleikararnar, ið skulu takast út til dreingjalandsliðið.

*hilmarjan@sosialurin.fo*




*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FIMLEIKUR** Tær tríggjar steypakappingarnar í amboðsfimleiki, sum plaga at vera tíðliga á árinum, eru nú farnar aftur um bak. Seinasta av teimum var leygardagin

Hilmar Jan Hansen

Leygardagin var triðja og seinasta steypakappingin í amboðsfimleiki í Fimi í Havn. Frammanundan høvdu kappingar verið leygardagin 5. februar og leygardagin 22. januar.

Tó vóru tað bert konufólk, ið vóru við til ta fyrstu kappingina, so tí høvdu mannfólkini so mikið meira at gera í aðru kappingini, tí tá vóru tríggjar greinir á skránni hjá teimum ein og sama dag.

Orsøkin til tað var, at tað eydnaðist ikki at fáa dómarar til kappingarnar hjá monnunum beinanvegin, so tí gjørdust tað bara tvær steypakappingar hjá monnum, mansunglingum, dreingjum og smádreingjum.

Niðanfyri hava vit tikið saman um allar tríggjar steypakappingarnar, so ein hóming fæst av, hvørjir fimleikarar serliga hava útmerkað seg. Harumframt hava vit eisini aðrastaðni á hesi síðu úrslitini hjá trimum teimum bestu í hvørjari grein frá steypakappingini leygardagin.

### Kristina var best

Hjá kvinnunum var Kristina Toftegaard úr Havnar Fimleikafelag tann stóri vinnarin í steypakappingunum, tí hon vann í trimum av fýra greinum. Leygardagin vann hon á gólvi, umframt at hon eisini vann kappingarnar í lopi og á bita. Í forskotnari barr gjørdist tað hinvegin Katrin Wardum, somuleiðis úr Havnar Fimleikafelag, ið vann.

Øssur Debes Eiriksfoss hevur verið tann drúgvasti hjá monnunum. Hann vann leygardagin bæði í ringum og lopi, umframt at hann fyrr hevði vunnið í rekk. Rósing Dam hevði frammanundan vunnið á gólvi og í barr. Báðir eru úr Havnar Fimleikafelag.

Í steypakappingini leygardagin var Eyðvør W. Samuelsen úr Ljósinum best hjá kvinnuunglingum á gólvi, men annars eydnaðist Anniku B. Hansen úr Støkk at vinna bæði í forskotnari barr og á bita í undanfarnu kappingunum, og Bára Persson úr Havnar Fimleikafelag vann ta einu kappingina í lopi.

Kappingin hjá mansunglingum hevur verið millum tveir fimleikarar úr Havnar Fimleikafelag, Pætur Jacobsen og Sofus Andreasen, og teir hava vunnið aðru hvørja grein. Leygardagin vann Pætur í lopi og Sofus í ringum, men í fyrru kappingini vann Pætur vunnið á gólvi og í barr, og Sofus vann í rekk.

### Vann fimm av seks

Marianna G. Eystberg úr Ljósinum vann á gólvinum hjá gentum leygardagin. Í aðru steypakappingini vann Bjørt H. Joensen úr HF í forskotnari barr og lopi, og Lív B. Árting vann á gólvinum í tí fyrstu av teimum trimum kappingunum.

Bartal Wardum úr Havnar Fimleikafelag var stóri slúkurin hjá dreingjum, tí hann vann tilsamans fimm av seks greinum. Hann vann á gólvi, í rekk, barr, ringum og lopi, men leygardagin vann Rani Petersen úr Havnar Fimleikafelag í lopi.

Hjá smádreingjum var Hannes Agnarson úr Havnar Fimleikafelag um vikuskiftið bestur í ringum og beinsveiggi, og í fyrru steypakappingini hjá teimum vann hann eisini í rekk og barr. Aron Jacobsen úr Havnar Fimleikafelag var leygardagin bestur í lopi, og hann vann eisini á gólvi í tí fyrru steypakappingini.

*hilmarjan@sosialurin.fo*